

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 11 - 2011

# Faroe Petroleum borar í lovandi oljuøki

Faroe Petroleum boðar frá, at nú verður borað á T-Rex leitimiðinum í Norska Havinum. Felagið eigur 30% av loyvinum. T-Rex leitimiðið fevnir um teigarnir 6506/12 og 6506/2 og 3, sum liggja nær við Smørbukk framleiðslueindina, har Statoil er fyristøðufelag. Á hesum økinum gjørdi Faroe Petroleum fundini Fogelberg og Maria í fjør. Høvuðsmálini fyri T-Rex brunnin (6406/3-9) eru jarðarfláir, har olja er funnin í brunni, sum Statoil boraði í 1991 á kantinum av T-Rex leitimiðinum. Oljuberandi sandurin verður mettur at verða tjúkri og betri, har sum borað verður nú. Mærsk er fyristøðufelag á T-Rex leitimiðinum, og eigur 70% av loyvinum. Transocean Winner boripallurin borar brunnin, og væntandi verður komið á mál tíðliga í 2012. Faroe Petroleum fekk tillutað T-Rex leitiloyvið í sambandi við norska APA útbjóðingarumfarið í 2006. T-Rex er annar av trimum norskum leitibrunnum, sum felagið borar í 2011 á einum øki har nógv olja er funnin, og har Faroe Petroleum hevur serligan førleika. Samstundis sum T-Rex brunnurin verður boraður, verður ein síðusporsbrunnur boraður á Butch fundinum, fyri at kanna um meiri olja finnst djúpri í fundinum. Triði leitibrunnurin á norskum øki er Kalvklumpen, sum væntandi verður boraður í desembur mánaða.